## Stríð um krøv til danskar prædikumenn

– Religiøsir prædikumenn skulu upp til roynd í donskum máli í heimlandinum, áðrenn teir kunnu fáa uppihaldsloyvi í Danmark!

Soleiðis ljóðar eitt uppskot frá danska integrasjónsráðharranum. Uppskotið fer ikki bert at raka muslimskar imamar, men eisini kristnar trúargreinar uttanfyri fólkakirkjuna.

Bæði tann katólska kirkjan og Kirkernes Integrationstjeneste ávara um, at kravið um málførleikan fer at oyðileggja tað kirkjuliga arbeiðið millum innflytarar og flóttafólk, skrivar Kristeligt Dagblad.

Ístaðin skjóta teir upp, at útlendsku prædikumenninir sleppa við einum tvungnum skeiði í donskum í seinasta lagi hálvt ár aftaná at teir eru komnir til landið.

Bæði Venstre og Dansk Folkeparti eru sinnað at hyggja eftir, um hetta kravið kann gerast smidligari.

Integrasjónsráðharrin, Rikke Hvilshøj ynskir ikki at koma við viðmerkingum, nú stuðulin til uppskot hennara sær út til at minka.

Uppskotið verður annars lagt fram mikudagin.

# 30.000 skinn úr øllum landinum

**AG-Kjøt á Toftum vónar at fáa so mong skinn í ár. Sum støðan sær út beint nú, fer tað helst eisini at eydnast teimum.**

SKINN
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Toftir:** Í lýsing í Sosialinum 6. november boðaði felagið AG-Kjøt frá, at teir tóku ímóti seyðaskinnum á Toftum nakrar dagar fyrr í hesum mánaðinum. Hesar dagarnar kom væl av skinnum inn, m.a. eini 400 frá flettingarmonnum í Tjørnuvík.

Um vikuskiftið var høvið at sleppa av við skinn á Tvøroyri, Sandi og á Royndarstøðini í Kollafirði. Opið ar frá kl. 10 til 17 á hesum støðum.

– Tá eg tosaði við teir á middegi í dag, var talið farið at nærkast teimum 25.000 skinnunum, segði Alberg Gaardlykke við Portalin stutt eftir middag leygardagin.



*Millum tey 30.000 skinni teljast 400 sum Dávur Emil Hansen kom við úr Tjørnuvík*

**Til Polen**

Móttøkan av skinnunum verður gjørd eftir eini kunngerð um útflutning av seyðaskinnum og neytahúðum til ES-londini. Henda kunngerðin varð sett í gildi 18. november í fjør.

Millum treytirnar fyri móttøkuni er hon, at skinnini skulu hava ligið í salti í minst 21 dagar.

Aðrar treytir eru, at seyðurin ikki skal vísa nøkur tekin um sjúku, ið kann smitta dýr ella menniskju, ella stava frá garði ella hagaparti har klinisk tekin hava verið um ridluskriða seinastu trý árini.

Alberg Gaardlykke upplýsir, at skinnini verða útflutt til Polen, umvegis ein týskan millummann.

# Fuglfirðingar vilja víðka um marknaðin

**Fyrst var ein fundur skipaður saman við vinnuni. Í farnu viku átti so handilsvinnan túrin. Málið er at fuglfirðingar skulu hugsa út um egið býarmark, og síggja alt landið sum ein marknað**

MARKNAÐUR
*Snorri Brend*

Fuglafjørður: Eini 25 fólk møttu upp til tiltakið, sum var at meta sum ein byrjan til at fáa samskipað viðurskiftini hjá handilsvinnuni betur. Hetta ger ikki minst galdandi, nú onnur økir í nánd av býnum brynja seg út til kapping. Millum hesi økini er ætlaði handilsdepilin, sum er í gerð í Gøtudali.

Á fundinum helt Røgvi Róin, marknaðar- og søluleiðari fyrilestur har hann vísti á tær avbjóðingarnar, sum handilsvinnan í býnum kemur at standa fyri í komandi tíðum.

– Neyðugt er, at handilsvinnan stendur saman og skipar seg sum ein maður úteftir, vísti hann á. Handilsvinnan eigur at fáa sær marknaðir um alt landið, fyri at fáa fleiri fíggjarlig bein at standa á.

Borgarstjórin greiddi frá, at býráðið í sambandi við fíggjarætlanina fyri 2007 hevði avsett pening til at seta í starv ein marknaðarleiðara hjá kommununi.

Ætlanin er at hesin m.a. skal taka sær av øllum áhugamálum í býnum, bæði mentanarlig, handilslig og vinnulig.

Hesum átaki tók handilsvinnan sera væl ímóti.

## Sjúkrarøkt: Lønin samsvarar ikki ábyrgdini

Nærum 90% av øllum sjúkrarøktarfrøðingunum halda, at samsvar er ikki millum arbeiðsnøgd, ábyrgd og løn.

– Lítla lønin elvir til irritasjón, líkasælu, manglandi og undirlutakenslur, sigur ein sjúkrasystir í trivnaðarkanningini, sum Granskingardepilin fyri Økismenning hevur latið gera.

Í kanningini er spurt um lønina sum sjúkrarøktarfrøðingarnir fáa, og her sæst skilliga at hon samsvarar ikki við arbeiðsbyrðuna.

Vanligastu hættirnir at samsýna starvsfólkinum er við løn, møguleikum at gera karrieru og við viðurkenning. Tað eru tó kanska helst viðbøturnar fyri tær skeivu arbeiðstíðirnar sum eru ov lítlar, serliga tá hugsað verður um at sjúkrarøktarfrøðingarnir arbeiða skiftandi vaktir, halgidagar og vikuskifti.

– Skulu vit fáa nýggjar sjúkrarøktarfrøðingar og fáa tey at verða verandi í starvinum, er at hækka normeringina og lønina munandi, sigur ein sjúkrarøktarfrøðingur í 50'unum sambært kanningini.

## Fleiri ynskja annað starv

Ikki bert í Føroyum, men eisini í nógvum øðrum londum er gongdin hon, at sjúkrarøktarfrøðingar ikki støðast á arbeiðsplássinum.

Trivnaðarkanningin um arbeiðsumstøðurnar hjá føroysku sjúkrarøktarfrøðingunum vísir, at eini 60% av teimum umhugsa at fara í annað starv.

Og hetta verður staðfest, hóast nógv tær flestu eru fegnar um starv sítt, og eisini meta at løn og leiðsla eru góð og at teir fáa spennandi og krevjandi avbjóðingar.

Tað løgna í hesum er, at hetta talið er munandi hægri enn hjá starvsfelagum teirra í Danmark. Har ynskja bert 39% at fara í annað starv.

Orsøkirnar til at teir ynskja at fara í annað starv eru m.a. tí at arbeiðið er ov strævið, at tað eru ov nógvar ósemjur og vegna starvsfelagar teirra.

Fleiri ynskja eisini at gevast sum sjúkrarøktarfrøðingar fyri at fáa nýggjar avbjóðingar og tí teir hava eitt ynski um at royna okkurt nýtt.